UTTAN ÚR HEIMI

# Vónarinnar maður sum gjørdist einaræðisharri

**Søgan um forsetan í Haiti, Jean-Bertrand Aristide, er ein moralsk frásøgn um, hvussu vald kann ávirka fólk. Mong av teimum, sum mettu hann sum tann karibiska Nelson Mandela, halda í dag, at hann líkist mest einum einaræðisharra**

HAITI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Árið í ár varð ætlað at vera eitt hátíðarár í Haiti, tí í ár eru 200 ár liðin, síðani tað lítla landið varð skipað sum heimsins fyrsta svarta lýðveldi.

Av røttum skuldi tann fólkavaldi forsetin, Jean-Bertrand Aristide, staðið uttan fyri forsetaborgina í høvuðsstaðnum Port-au-Prince og heilsa mannamúgvuni, sum skuldi fagna bæði honum og landsins stóra degi.

Men ístaðin er støðan ein heilt onnur. Forsetin er byrgdur inni og illa lýddur. Tey, sum finnast at honum, leggja hann undir einaræði. Brotsmenn hava valdið í einum stórum parti av landinum, og minst 50 fólk hava latið lív í samanbrestum og ófriði í gøtunum. Gamla hjálandaveldið Frakland umhugsar at senda hermenn til landið at fáa skil á.



*Jean-Bertrand Aristide*

*Mynd: Reuters*

## Ein Mandela

Útlitini vóru tey bestu, tá Jean-Bertrand Arisitde kom til valdið í 1990 aftan á tað fyrsta demokratiska forsetavalið í Haiti. Hann fekk 67 prosent av atkvøðunum, so eingin setti spurnartekin við valið.

Jean-Bertrand Aristide hevði frammanundan arbeitt sum katólskur prestur ímillum tann fátæka partin av fólkinum. Hann hevði góðar taligávur og gjørdi nógv burtur úr at lýsa tey vánaligu viðurskiftini hjá teimum fátæku. Í honum sóu fólk eina vón um eina betri framtíð - ikki bara í Haiti, men í øllum Karibia. Hann var eitt slag av einum karibiskum Nelson Mandela.

Men skalt tú framat, skal onkur annar frá, og teir, sum sótu við valdið, vóru alt annað enn sinnaðir at lata prestin og atfinnaran sleppa framat. Bara sjey mánaðir aftan á forsetavalið í 1990 koyrdi herurin Jean-Bertrand Aristide frá.

## Broyttist í USA

Hann flýddi til USA, men meðan hann var har, avdúkaði hann nakrar higartil ókendar partar av sínari persónsmensku. James Morell, sum er leiðari á Democracy Project í Washington, kom at kenna Aristide í 1992 og gjørdist skjótt ein av hansara ráðgevum. Men í dag er hann ein av teimum vónsviknu.

- Hann hevur framt brot á mannarættindini. Hann er vorðin ein einaræðisharri. Tá fólk gerast forsetar og ganga ímillum trygdarfólk dagin langan, kann tað ávirka tey. Tey tola ikki at verða nevnd tygara hátign, sigur James Morell.

Í amerikanska høvuðsstaðnum vóru tað haraftur-ímóti mong, sum hildu tann frákoyrda haitiska forsetan vera ein úrmæling. Ja, hann varð so nógv avhildin har, at í 1994 gjørdi Bill Clinton, forseti, av at senda 20.000 hermenn til Haiti, og við góðkenning frá ST varð tann frákoyrdi forsetin settur aftur í embætið.

Men tá teir amerikonsku hermenninir vóru farnir heimaftur, fór tað at ganga niður á bakka hjá Jean-Betrand Aristide. Kortini fekk hann meiri enn 80 prosent av atkvøðunum á forsetavalinum í 2000, og hann varð alt fyri eitt lagdur undir svik.

Mótmælini vundu upp á seg. Fátækradømið var tað sama, sum tað hevði verið. Sjálvur valdi forsetin at fáa sær egnar vápnaðar deildir. Nakrar teirra hava seinni svikið hann og eru nú við til at gera seg inn á sivilfólkið.

## Avbyrgdur

Men Aristide er ikki einsamallur. Hann hevur sínar sameindu. Stjórnin hjá George W. Bush, forseta heldur hondina yvir honum. Hann plagdi at borga fyri tryggum viðurskiftum, USA hevur úr at gera aðrastaðni, og so er forsetin hóast alt formliga valdur. Tað hevur kortini ikki altíð forðað USA í at leggja uppí ymsastaðni, og aftan tjaldið eru tað mong, sum halda, at amerikanararnir í veruleikanum virka fyri at fáa Aristide frá.

Tað er nú ikki vist, at tað fer at loysa trupulleikarnar. Robert Fatton, sum er serkønur í viðurskiftunum á Haiti, sigur, at andstøðan í Haiti hevur ongan, sum er egnaður at taka við. Tí heldur hann, at tað frægasta hevði verið at skipa eina eindarstjórn, sum bæði Aristide og andstøðan eiga at manna. Hann væntar kortini ikki, at fólkið sjálvt er ført fyri at fáa eina slíka eind í lag, og at altjóða uppílegging tí kanska verður neyðug fyri at forða fyri sonnum ruðuleika í Haiti.

Ímeðan situr Aristide avbyrgdur í húsum sínum saman við konuni og teimum báðum børnunum. Prestagerningin hevur hann lagt frá sær, men forsetastarvið heldur hann fast um. Tað er helst eisini tað týdningarmesta, sum hann nakrantíð hevur havt.

*0 Kelda: Berlingste Tidende*

ítróttur

Nr. 40 • fríggjadagur • 27. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Abraham verður landsliðsvenjari

**Fyrstu fyrireikingarnar til EM undankappingarumfarið, sum verður í Føroyum í oktober, eru á skránni nú í vikuskiftinum**

U–19 LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Tað er farið merkisvert skifti fram í ábyrgdini fyri U–19 landsliðnum. Øll árini, sum Føroyar higartil hava havt U–19 landslið, hevur Jógvan Martin Olsen verið venjari. Tað er hann ikki longur.

Jógvan Martin hevur framvegis høvuðsábyrgdina fyri øllum landsliðsarbeiðnum í yngru deildunum. Men nú eru tað Abraham Løkin og Pætur Clementsen, sum skulu vera venjarar hjá U–19 landsliðnum. Hetta er fyrsta árið, at Abraham er venjari hjá einum landsliði. Okkurt av undanfarnu árunum hevur hann kortini verið eitt sindur knýttur at U–15 landsliðnum. Pætur Clementsen starvast á FSF skrivstovuni, og hann hevur frammanundan verið knýttur at U–17 landsliðnum.



*Abraham Hansen man vera ein tann drúgvasti 1. deildarleikarin í føroysku fótbóltssøguni. Nú skal hann royna seg sum venjari hjá U-19 landsliðnum*

Abraham hevur drúgvar royndir sum venjari. Eitt nú hevur hann vant NSÍ og ÍF, tá ið hesi feløgini hava verið umboðað í bestu deildini. Hesi seinastu árini hevur Abraham verið ungdómsvenjari hjá NSÍ. Tað er hann framvegis. Pætur Clementsen hevur í fleiri ár verið ungdómsvenjari í HB. Enn er formlig avtala ikki gjørd millum FSF og venjararnar. Men tað eru teir báðir, sum skulu standa fyri fyrstu venjingini, og tað skilst, at tað bara er ein spurningur um tíð, áðrenn formlig avtala fer at verða gjørd.

Einki er at ivast í, at tað verður serliga stórur áhugi fyri U–19 landsliðnum í ár. Hetta kemst av, at FSF fyri fyrstu ferð skal verða vertur fyri U–19 undankappingarbólkinum, sum Føroyar eru partur av. Kappingin verður í Føroyum fyrst í oktober. Umframt Føroyar eru í bólkinum Grikkaland, Ungarn og Wales.

## Nýtt ættarlið

Í fjør varð tilfarið til U–19 landsliðið mett at vera so mikið gott, at møguleikar áttu at havt verið fyri góðum avriki í EM kappingini. Tað hilnaðist ikki so væl. Fleiri av lyklaspælarunum vóru skaddir, og úrslitini vóru ikki góð.

Fyrsta venjingin hjá nýggja liðnum er á skránni nú leygardagin frá kl. 10 og til kl. 16. Møtt verður í FSF húsinum.

Sambært listanum, sum er sendur feløgunum, eru tað hesa ferð væl færri spælarar, sum hava royndir úr bestu deildini, enn tað vóru í fjør. Hetta kann sjálvandi broytast, tí tað er stórur møguleiki fyri, at fleiri av spælarunum, sum nú ætlast at vera við til at mynda U–19 landsliðið, fara at fáa møguleikan í bestu deildini í kappingarárinum, sum nú stendur fyri framman.

Í fyrsta umfari hava 26 spælarar fingið boð. Sum tað plagar at vera, so eru flestir úr havnarfeløgunum, men tað er merkisvert, at so at siga øll feløgini í bestu deildini og okkurt felag í 2. deild eru umboðað.

Spælararnir eru hesir: Svenn Jacobsen, Poul T. Dam, Páll Mohr Joensen, John Eivind R. Mouritsen og Emil Nolsøe Leifsson, HB, Justinus H. Hansen, Debes Danielsen, Tórður Thomsen og Búgvi V. Olsen, NSÍ, Símun Louis Jacobsen og Jan Poulsen, GÍ, Johan V. Gunnarsson, Ásbjørn V. Gunnarsson og Mikkjal Hvannastein, B36, Símun Rógvi Hansen og Mikkjal T. Hentze, B71, Fritleif í Lambanum, ÍF, Jóhan Petur Poulsen, B68, Hanus Holm Stórhamar og Ragnar Mortensen, TB, Arnbjørn Theodor Hansen, EB/Streymur, Poul N. Poulsen, Marner Ludvig og Arthur Tausen, VB og Julian Samuelsen og Urbanus Olsen, KÍ.



*Hendan myndin er frá steypafinaluni hjá unglingum millum GÍ og EB/Streym, ið varð leik á Tórsvølli seinasta summar. Nú fáa nakrir av okkara fremstu ungu leikarum aftur høvdi at royna seg á grasi, tá ið føroyska U-19 landsliðið fer til verka*

## Leygardagin 28. febr. skipar ÍSB fyri skeiði fyri ítróttalærarar/ venjarar

Anne Merete Kisow og Vibeke Lund frá Handicapidrættens Videnscenter fara at taka sær av frálæruni á skeiðnum. Skeiðið er ætlað at geva lærarum og venjarum góð hugskot til fjølbroytni í dagliga arbeiðnum. Hetta verður gjørt við ymiskum, sum kann brúkast beinleiðis aftur í tímunum, men sum eisini kann leggjast sum grund undir eini størri undirvísingarheild. Samstundis verða ymiskir undirvísingarhættir tiknir upp, so hædd verður tikið fyri aldur, førleika o.ø.hjá teim íðkandi.

Skeiðið verður á Føroya Læraraskúla og byrjar kl.10.